## Kapprenningin heldur fram

Chelsea tók ikki av møguleikanum, sum teir fingu leygardagin. Tá spældi Manchester United nevnliga javnleik móti Middlesbrough. Tí kundi London-liðið minka munin til Manchester niður í eitt stig, tá teir spældu móti Newcastle sunnudagin, men tí møguleikanum tóku teir ikki av. Dysturin á St. James's Park endaði nevnliga málleysur, og so kundu reyðu devlarnir av Old Trafford draga andan lættari. Munurin millum tey bæði oddaliðini er tí trý stig, nú fýra dystir eru eftir at spæla.



## Atli og Frem taptu

Atli Danielsen var í miðverjuni allan dystin, tá Frem spældi útidyst móti Fredericia. Hann megnaði tó ikki at forða vertunum í at vinna dystin við tveimum málum móti ongum. Frem er 8. plássi í donsku 1. deild.

NSÍ-VB/Sumba 5-2 (1-1):

# Andersson aftur høvuðsleikari

*NSÍ*

*VB/Sumba*

**Suðuroyarliðið megnaði tvær ferðir at geva NSÍ ein rættuligan hvøkk, men brasilski Anderson skoraði fýra ferðir og syrgdi fyri trivaligum heimasigri við Løkin**



*Við sigrinum eru runavíkingarnir nú ájavnir EB/Streymi í oddinum í Formula-deildini*

NSÍ-VB/SUMBA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Hann arbeiðir ikki serliga nógv, men hann veit, hvat tað snýr seg um. Anderson Casthilio spælir við NSÍ, tí hann tey bæði árini, tá ið hann var á Toftum vísti, at hann dugir at skjóta mál.

### Málrevurin

Og Anderson syrgir fyri tí, sum hann er keyptur til Runavíkar at gera. Eftir fimm umfør er hann toppskjútti í Formuladeildini. Hann hevur skorað átta mál. Sunnudagin skoraði hann fýra ferðir ímóti VB/Sumba. Hetta var onnur ferðin, at brasiliumaðurin var meistari fyri hattrikkið. Fyrra ferðin var, tá ið NSÍ á heimavølli vann 3-0 á B36.

Anderson flytir seg ikki so nógv. Men hann veit, hvat tað snýr seg um. Hann er røttu løtuna á rætta staðnum. Tað er ikki altíð, har allir hinir eru. Ofta snýkir hann seg afturum hinar, og so er hann fínur við høvdinum. Tá ið møguleikin býðst er hann tryggur á bóltinum sum fáur. Tað hevur higartil borði átta mál við sær, og NSÍ telist millum tey allar fremstu.

Meistarafótbólt var einki at síggja til størsta partin av 1. hálvleiki. Tað minti ikki so lítið um avrikið ella rættari manglandi avrikið, sum teir gulu og svørtu vístu í Klaksvík næstsíðsta sunnudag. Teir í NSÍ vóru lítið avgjørdir, og tað gekk long tíð, áðrenn teir megnaðu at seta gestirnar undir tað trýstið, sum tað kundi roknast við, at teir fóru at megna.

### Gestirnir hóttu

Tað kann gott vera, at VB/Sumba dyrgdi eftir einum stigi. Men fyrstu løtuna vóru tað fremmanda menninir við Løkin, sum slerdu tónan ann. Evrard Ble arbeiddi nógv á miðvøllinum, har hann eisini hevði orku til at skipa framrættaða spælið, og Birgir Jørgensen megnaði fleiri ferðir at leggja trýst á NSÍ miðverjarnar og málverjan.

Fyrsta stóra hvøkkin fekk NSÍ, tá ið tíggju minuttir vóru farnir. Ble spældi Birgir Jørgensen leysan í vinstru. Jens Martin hálvbjargaði, og miðvallarin Aca Pandurevic, sum júst er komin til Vágs, var fyrstur á returinum, og so var 1-0 til VB/Sumba, og fyritreytirnar hjá vágbingum vóru uppafturbetri, enn tær høvdu verið.

VB/Sumba sjálvsálitið øktist, og heimamenninir vóru á ongan hátt leysir av hóttanini av, at tað kundi taka seg heilt illa upp.

Tá ið tað restaðu tíggju minuttir av 1. hálvleiki var Anderson fyrstu ferð uppá spæl. Jústinus R. Hansen legði innfyri úr høgru, og verjan hevði mist einsamalla framherjan burtur. Tað varð ikki ósektað. Anderson smekkaði høvdið undir bóltin og so var javnleikur.

Útjavnandi málið gav heimaliðnum sjálvsálit, og teir kundu havt lagt seg á odda, men Vlada Filipovic vardi væl.

### Punkteraðu

VB/Sumba legði fyri í 2. hálvleiki soleiðis, sum teir høvdu gjørt í fyrra umfari. Tveir minuttir eftir steðgin skoraði ein av blaðungu monnunum, Martin Tausen, var leysur í høgru, og úr spískum smekkaði hann framvið Jens Martini.

So var lagt upp til, at klokkan skuldi arbeiða fyri VB/Sumba. Men teir megnaðu bara at halda tørn í tríggjar minuttir. Sjúrður Jacobsen átti framleggingina úr vinstru, og Anderson heilfluktaði í málið.

At Evrard Ble eftir lítið korter noyddist skaddur av vøllinum var dyggur smeitur hjá VB/Sumba. Lítla løtu seinni stútaði Anderson frísparksframlegging í kassan, og so var spurningurin bara, hvussu stórur heimasigurin fór at verða. Arbeiðssami Hjalgrím Elttør átti innleggið úr vinstru, sum Anderson umsetti til 4-2, og innskifti Øssur Dalbúð staðfesti rimmar sigurin.

## Arnbjørn og Marner vunnu FM

**Talan var um spennandi kapping, men tað eydnaðist Arnbjørn Sivertsen og Marner Joensen at vinna FM-kappingina fyri pør**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Leygardagin varð finalan fyri pør í Bridge leikt í Bridgehúsinum í Havn.

16 pør høvdu rætt at luttaka í finaluni, ið var spæld sum ein barometur kapping við 15 umførum á 4 spøl.

Í mun til hálvfinaluna, so gekk tað framúr væl hjá teimum, ið skipaðu fyri hendan dagin, og skulu tey hava rós fyri tað.

Finalan gjørdist sum vænta rættiliga spennandi. Fleir pør skiftust at liggja á odda. Eitt skifti sá tað út til, at FM vinnarinir frá í fjør rættiliga høvdu fingið vind í seglini og at teir fóru frá hinum. Men tað gekk ikki. Eitt vánaligt umfar móti sera sterku veteranunum Niels Nielsen og Hans Jacob Petersen steðgaði góðu gongduni.

Tað vóru eini fýra fimm pør, ið nærum allatíðina høvdu møguleika vinna. Tað var ikki fyrr enn í næst seinasta umfarinum, tá ið Bogi Simonsen – Hallberg Arnfríðson spældi móti Arnbjørn Sivertsen og Marner Joensen, at spenningurin fór. Pørini lógu undan hesum umfarinum áfremstu sessunum. Arnbjørn og Marner høvdu eitt framúr umfar og vunnu stórt. Sostatt var avgerðin um fyrsta plássið follin. Nú var spenningurin so um, hvør fekk silvur. Tað eydnaðist Boga og Hallberg við tí besta umfarinum hendan dagin at koma uppá aftur og vinna slivur.



*Saman við Arnbjørn Sivertsen vann Marner Joensen FM-finaluna fyri pør í bridge*